

## Wilbek skiftir út

Undan millumspælinum í HM.endaspælinum í hondbólti hjá monnum hava øll liðini møguleika at skifta onkran leikara út. Hetta kann vera orsaka av skaðum ella tí at venjarin metir, at onkur leikari ikki hevur spælt upp til sítt besta. Venjarin hjá dønum, Ulrik Wilbek, hevur valt at taka av hesum møguleikanum. Í morgun valdi hann at senda Kasper Søndergaard og Bo Spellerberg heim, og í staðin hevur hann innkallað spælstýraran, Claus Møller Jacobsen, og stórskjúttan hjá danska felagnum Skjern, Lars Møller Madsen.

## Glaðir fyri áskoðararnar

- Vit vistu, at hetta fór at gerast ein harður dystur. Vit fáa eina keðiliga byrjan uppá seinna hálvleik, men sjálvt um vit ikki fáa álopið at koyra, so fáa vit skil á í verjuni, og hetta vinnur at enda dystin fyri okkum. Hetta segði danski landsliðsleikarin, Søren Stryger, eftir dystin ímóti Noregi. Bæði hann og Ulrik Wilbek vóru eisini sera fegnir um leiklutin hjá donsku áskoðarunum. – Uppbakningurin var fantastiskur. Tað merktu vit veruliga, tá vit vóru aftanfyri 15-18. Áskoðararnir vóru heilt víst við til at lyfta liðið í dag, segði Ulrik Wilbek eftir dystin.

Neistin-StÍF:

# StÍF hevur takið á Neistanum

**StÍF vann fyrru hálvfinaluna við trimum málum, og tí eru teir favorittar at røkka finaluni undan seinna dystinum í Coca Cola-kappingini, sum verður í Havn**




*StÍF hevur betra útgangsstøðið undan seinnu hálvfinaluni ímóti Neistanum.*

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Mikukvøldið verður seinna hálvfinalan í Coca Cola-kappingini á skránni ímillum Neistan og StÍF í manshondbólti. Fyrri dysturin endaði við 3 mála sigri til StÍF, og tí hava teir sett beina kós ímóti finaluni. Leiðslan er tó ikki størri, enn at Neistin væl og virðiliga kann tryggja sær sæti í finaluni. Kravið er tó at vinna við fleiri enn trimum málum.

**StÍF hevur munin**

Hyggja vit at undanfarnu dystunum ímillum liðini bæði í hesum kappingarárinum, so má sigast, at StÍF hevur havt munin.

Tríggjar ferðir hava liðini møtt hvørjum øðrum í landskappingini, og allir dystirnir eru endaðir við sigri til StÍF. Munurin hevur tó ikki verið serliga stórur. Strandingar hava nevniliga vunnið allar dystirnar við einum máli, og tí kann bara staðfestast, at teir duga betri at halda høvdið kalt í avgerandi løtunum.

Fyrra hálvfinalan fall eisini til fyrimuns fyri strandingar, men hesa ferð var munurin 3 mál, og neistamenn skulu vera glaðir fyri, at munurin ikki gjørdist enn størri. Strandingar førdu nevniliga stórt mitt í seinna hálvleiki, men móti endanum kom Neistin væl aftur, og tí er dysturin enn rættiliga opin undan seinnu hálvfinaluni.

**Síðsti møguleiki hjá Neistanum**

Sunnudagin tapti Neistin ein týdningarmiklan dyst ímóti júst strandingum í landskappingini. Hesin ósigur førdi við sær, at Neistin nú er heili 5 stig aftanfyri StÍF, sum liggur á øðrum plássi í landskappingini. Tí eru møguleikarnir ikki serliga stórir hjá bláa havnarliðnum at røkka finaluni um FM-heitið. Coca Cola-kappingini kann tí vera seinasti møguleiki hjá Neistanum at vinna nakað í ár, og tí fara teir helst at leggja nógv fyri í teirra royndum at vinna seinnu hálvfinaluna ímóti strandingum.

Teir skulu tó ikki vænta sær nakran léttan dyst, tí StÍF hevur verið mest sum fastur luttakari í steypafinaluni hjá monnum síðstu árini.

KÍF-VÍF:

# Alt kann henda

**Fyrru hálvfinaluna vann VÍF við einum máli, og tí er hálvfinalan í Coca Cola-kappingini ímillum KÍF og VÍF púra opin undan seinna dystinum í Kollafirði**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lagt verður upp til eina spennandi seinnu hálvfinalu í Coca Cola-kappingini mikukvøldið, tá KÍF tekur ímóti VÍF. Fyrra dystin í Vestmanna vann VÍF við einum máli.

**KÍF vann stórt seinast**

Í grundspælinum hevði VÍF takið á kollfirðingum. Fyrri dysturin í Vestmanna var sera spennandi, men móti endanum dró VÍF frá og vann dystin við trimum málum. Í seinna dystinum, sum var í Kollafirði, var gongdin at kalla júst tann sama. Aftur fylgdust liðini stóran part av dystinum, men móti endanum gjørdist VÍF enn einaferð drúgvara liðið..

Fyri góðari viku síðani møttust liðini so fyri triðju ferð í landskappingini, tá KÍF tók ímóti VÍF í endaspælinum. Hesin dysturin var eisini aðalroyndin undan seinnu hálvfinaluni, og her var eingin ivi um sigurin. Kollfirðingar vóru snøgt sagt nógv betri enn VÍF, og teir vunnu eisini dystin við sjey málum. Við sigrinum hava teir víst, at teir kunnu vinna á vestmenningum, men teir skulu ikki vænta nakran léttan dyst.

**Rutinan á muni**

KÍF hevur ikki verið í steypafinaluni í hondbólti síðani einaferð í 80'unum, og tí ætla teir sær heilt sikkurt at gera nógv fyri at røkka finaluni í ár. Teir møta tó einum sera sterkum VÍF-liði, sum næstan ikki hevur verið til at steðga í ár.

Ein av størstu mununum á liðunum er rutinan. VÍF hevur nógvar eldri leikarar, sum hava staðið í hesi støðuni fyrr, meðan KÍF er mannað við nógvum ungum leikarum, sum ongantíð áður hava leikt so týdningarmiklan dyst. Tí er VÍF kanska lítil favorittur undan seinnu hálvfinaluni, men spælir KÍF upp til sítt besta, so er als ikki óhugsandi, at teir kunnu røkka til finaluna í Coca Cola-kappingini.

VB-Kyndil:

## VB á finalukós

**VB hevur meir enn annað beinið í finaluni í Coca Cola-kappingini hjá kvinnum undan seinna hálvfinaludystinum ímóti Kyndli**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyri tveimum vikum síðani leiktu Kyndil og VB fyrru hálvfinaluna í Coca Cola-kappingini hjá kvinnum, og tann dystin vann VB trygt. Vágskvinnur vunnu við heili 6 málum, og sostatt skal nógv ganga galið hjá teimum, um tær ikki skulu røkka finaluni í steypakappingini hjá kvinnum.

VB hevur eisini havt fult tamarhald á Kyndli í ár. Fýra ferðir hava liðini møtt hvørjum øðrum, og allir dystirnir eru endaðir við sigri til VB. Í fyrra dystinum í grundspælinum, sum var í høllini á Hálsi, vann VB við fýra málum. Mitt í november spældu hesi bæði liðini so seinna innanhýsis dystin í grundspælinum. Hesin dysturin var væl javnari, men enn einaferð dró VB longra stráið og vann við tveimum málum.

Í endaspælinum møttu liðini eisini hvørjum øðrum beint undan fyrru hálvfinaluni í Vági, og her vann VB tryggan 7 mála sigur.

Sostatt hevur VB havt sera gott tak á Kyndli í ár, og tí skal sera nógv ganga galið hjá teimum, um tær ikki skulu enda